*Kæru fundarluttakarar og fyriskiparar*

Tikið 0verður til, at leingi er tað, ið væl skal vera.

Í politisku skipanini hevur man tey síðstu 20 árini tosað um at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita.

Tað hevur verið nógv tos, og tað hevur verið nógv kjak, óteljandi politiskir pallborðsfundir, kjak í útvarps- og sjónvarpsstovum, og álit eru skrivaði upp í leypar um hetta mál. Umframt hetta, hava arbeiðsbólkar í hópatali sitið og viðgjørt spurningin um, hvussu eldraøkið skal skipast.

Úr rúgvuni kunnu t.d. nevnast:

- Grøna álitið frá 1996
- Tilmæli frá arbeiðsbólki varð handað landsstýrinum 2002
- Álitið "Kommunur, eindir og uppgávur" varð handað landsstýrinum í 2009
- Tilmæli um eldrapolitikk varð handað í 2012

Tað, sum øll hesi álit og tilmæli hava til felags, er, at tey mæla til, at greiða má fáast á fløkta myndugleikabýtinum millum land og kommunur. Samstundis mæla tey til, at vald og gjald skal fylgjast at, til tess at tryggja fakliga dygd og trygd, soleiðis at borgarin fær so góða tænastu sum gjørligt.

Fortreytin fyri einum skynsamum rakstri og menning kann bara fáast, um ógreiðan á myndugleikabýtinum verður greidd, og at vald og gjald veruliga fylgist at.

*

**Eldraøkið – ein kommunal ella landsuppgáva?**

At tað er umráðandi at savna eldraøkið undir ein myndugleika, er tað valla nakar, sum eru ósamdur í.

Men semja hevur ikki verið um, hvørt tað skal vera ein landsuppgáva ella ein kommunal uppgáva.

Og heldur enn at taka eina politiska støðu – eina politiska avgerð til henda spurning – hevur mann bara tosa um trupulleikan – hesa ógreiðuna – tey seinastu 20 árini.

*

Sitandi samgongan hevur tikið ta avgerð at fáa skipa viðurskiftini hjá okkara eldru borgarum við at leggja økið fult og heilt til kommunurnar at umsita 1. jan. 2015.

Hetta gera vit, tí vit eru sannførd um, at hetta fer at gagna okkara eldru borgarum.

Grundgevingarnar fyri hesum eru m.a.:

- Kommunurnar hava víst eldhuga fyri økinum, og fyritakssemi er komið frá kommununum at útbyggja eldraøkið við, eitt nú ellis- og røktarheimum og eldrasambýlum (treyðugt so við stuðli úr landskassanum)
- Kommunurnar hava borgaran tættari inn at sær, og síggja tann dagliga tørvin hjá borgaranum
- Politiskt ábyrgd verður lættari at staðfesta, tá tað er ein og sami myndugleiki, sum hevur ábyrgd av eldraøkinum (við ógreiðu viðurskiftini er tað ikki greitt fyri øllum borgarum, hvør hevur veruliga ábyrgd av hvørjum)
- Tað er skjótari frá tanka til handling. T.d. at seta eitt dagtilboð á stovn ella eitt nú at fáa telefonlinju til familjur, ið verða raktar av eitt nú demenssjúku. Hetta kann í ringasta føri taka fleiri mánaðir at fáa avgreitt í Løgtinginum orsakað av tungum politiskum mannagongdum, ímeðan hesi somu viðurskifti kunnu avgreiðast eftir fáum døgum undir kommunalum myndugleika
- Kommunurnar hava víst í verki, at tær megna at yvirtaka tung og týdningarmikil mál t.d. barnaansingarøkið

Vit hava álit á, at kommunurnar eru førar fyri at lyfta hesa uppgávu til fulnar – hava vit ikki tað, er spurningurin, hví vit yvirhøvur skulu hava kommunur.

*****

**<u>Fyrsta føroyska eldralógin</u>**

Í Føroyum hava vit onga eldralóg. Tænastustøðið er sera ymiskt kring landið í dag, og vantandi gjøgnumskygni valdar, og tey eldru hava onga veruliga lógartryggjaðan rættartrygd.

Vit hava alskyns lógir á øllum øðrum økjum, men viðurskiftini hjá teimum eldru eru ongantíð samlað í lóggávu.

Ein grundleggjandi fortreyt fyri útleggingini av eldraøkinum var tí at fáa til vega eina eldralóg – eina rammulóg, sum kann regulera viðurskiftini á økinum.

Tað fyrsta stigið í tilgongdini, var at orða ein eldrapolitikk, sum skuldi vera virðisgrundarlagið undir eldralógini. Ein breitt umboðandi arbeiðsbólkur handaði mær í 2012 tilmæli til eldrapolitikk – undir heitinum: Trivnaður, tryggleiki og lívsgóðska**.**

Ein av aðalhugsjónunum í politikkinum er at virða sjálvsavgerðarrættin hjá teimum eldru, fyribyrging og menning, soleiðis at tey eldru kunnu búleikast sum longst í egnum heimi, og at atlit skulu takast at heilsu og trivnaði hjá okkara eldri borgarum.

Hesi virði síggjast aftur nú í endamálsorðingini § 1[1] eldralógini, sum nú er til viðgerar í Løgtinginum.

---

[1] Grein 1: Endamálið við hesi lóg er at veita borgarum við tørvi á hjálp eina samskipaða heildartænastu.
*Stk. 2.* Endamálið við heildartænastuni er: a) at fyribyrgja sjúku, b) at stimbra sálarligu og likamligu heilsu og trivna borgarans, c) at endurmenna mistan førleika, d) at stimbra møguleika hins einstaka at klára seg sjálvan, e) at veita røkt og umsorgan.
*Stk. 3.* Hjálpin skal taka atlit til tørv og fortreytir borgarans, og skal í størst møguligan mun verða veitt í samráð og í samstarvi við hin einstaka.

*

Næsta stigi í tilgongdini var at smíða trý lógaruppskot, sum í løtuni eru til viðgerar í Løgtinginum:

- Løgtingslóg um kommunalt samstarv á eldraøkinum – eisini nevnd útleggingarlógin
- Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. – eisini nevnd eldralógin ella tænastulógin
- Løgtingslóg um ávís starvsfólkaviðurskifti, tá heimatænastan, eldrarøktin v.m. verður løgd til kommunurnar at umsita

Eg kundi hugsað mær at tosa eitt sindur meira um løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt, sum er mest týðandi í mun til evnið á fundinum í kvøld.

Endamálið við lógaruppskotinum at skapa karmar, sum kommunurnar skulu virka undir, tá tær koma at umsita eldraøkið.

Uppskotið er sostatt rammulóg, sum í fyrstu syftu ásetir teir karmar, sum kommunurnar skulu virka undir, í aðru syftu, hvørjar tænastuásetingar kommunurnar yvirskipað skulu liva upp til, fyri at røkka endamálinum við lógini, og í triðju syftu, hvørjar heimildir og skyldur kommunurnar hava í mun til fígging, rakstur o.a.

Tænastan, ið verður løgd til kommunurnar er hin sama, sum vit kenna hana í dag. Tað er tann sameinda tænastan, ið snýr seg um:

- Eldrarøkt (røktarheim, eldrasambýli o.l.)
- Heimatænasta (heimasjúkrarøkt, heimahjálp, økisterapi)
- Fyribyrgjandi tænastur (umsorganar arbeiði)
- Ansingarsamsýning

Lógaruppskotið viðvíkjandi tænastum avspeglar í stóran mun virksemið, sum tað er í dag.

Tó eru nakrar nýggjar ásetingar t.d. viðvíkjandi fyribyrgjandi heimavitjanum, setan av eldraráð og fráboðan frá fakfólki um ónøktandi umstøður hjá borgarum. Eisini er krav um kunning og almenna upplýsing um útboðið av tænastum og krav um eftirlit.

Grundleggjandi fyri hesar nýggju ásetingar er fyribyrging, sjálvsavgerðarrættur hjá eldri borgarum, tryggja nøktandi tænastuútboð, umframt at fyri fyrstu ferð verður sett krav um eftirlit.

Tá hugsað verður um sjálvt tænastustøðið, verður hetta nú fyri fyrstu fer ásett við lóg. Tað eru fakfólk, ið skulu meta um tørvin, og tænastan, ið verður veitt, skal standa mát við tørvin. Men tað verður ikki ásett við lóg, hvørja tænastu hvør einstakur skal hava og hvussu ofta. Hetta eru ikki mál, ið skal avgreiðast í Løgtinginum, men heldur skal tænastuveitingin vera tørvsstýrd, og atlit skal takast at hinum einstaka, við virðing fyri hansara sjálvsavgerðarrætti.

Málið er, at fólk skulu liva sum longst í egnum heimi, og verða so væl fyri, sum gjørligt. Tí er endurmenning eisini ein hornasteinur í hesi lóg og fyri fyrstu ferð verður endurmenning reguleráð í lóg.

Við lógini verður ásett at kommunurnar skulu tryggja at neyðugu tilboðini eru tøk og at endamálið sambært grein 1 verður rokkið. Og tað er ásett í lógini, at kommunurnar sum minstakrav skulu tryggja, at borgarar sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt og stuðli sambært lógini fáa neyðugu hjálpina.

Við lógini verður samstundis ásett at kommunurnar at hava fult og heilt ábyrgd av eldraøkinum, soleiðis at vald og gjald fylgjast at.

*

Tað ber altíð til at finnast at hesum og hasum, men eg fegnist veruliga um hetta stóra stigið í føroyskum lóggávusmíði, sum nú er til viðgerar í Løgtinginum, sum fer at tryggja okkara eldru borgarum eina betri tænastu.

Ynskilistin hevur gamaní verið langur í samband við hetta arbeiði, bæði hjá fakfólkum, áhugafeløgum og kommunum, og mítt arbeiðið hevur verið at finna eina javnvág ímillum hesi.

Í stóran mun endurspeglar rammulógin ta virksemi, sum í dag skipar eldraøkið undir landinum. Tó eru ásetingarnar meiri yvirskipaðar, og leggur hetta upp til, at kommunurnar hava frælsi til at skipa virksemi øðrvísi enn í dag.

*****

**<u>Laga vardar, seta seg at hvíla, málid er toppurin av fjallinum</u>**

Enn er langt á mál til at vit kunnu siga, at alt útleggingin av eldraøkinum er leyst og liðugt, og liggur í tryggari legu. Vegurin er langur niðaná sýnina - niðan á fjallatoppin, og hóast varðagøturnar eru greiðar, kann leiðin gerast tung og snávingarsteinar nógvir. Urðargrót og brattlendi kunnu gera, at neyðugt verður at fáa sær hvíld ella at finna aðrar leiðir niðaná. Men tað týdningarmesta er, at vit í dag kenna kósina, vit vita hvønn veg, vit skulu ganga, til tess at røkka á mál at náa niðan á toppin.

Takk fyri.

Annika Olsen,
Landsstýriskvinna í almannamálum